# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðurøki, Miðøki og Suðurøki halda til í ávikavíst Saltangará/Klaksvík, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Norðurøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

**Lýst verður eftir fólki til avbjóðandi starv á Norðurøkinum at byrja 1. august ella skjótast til ber.**

**Vit vænta at tú**
hevur útbúgving frá hægri lærustovni, so sum HA, HD, Cand Merc ella líknandi. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert nærlagdur, fyrikomandi og arbeiðssamur. Hevur tú HH, skrivstovuútbúgving ella líknandi og ætlar at útbúgva teg víðari innan roknskap og grannskoðan, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Arbeiðsuppgávur:**
- samskifti við virkir og stovnar
- vitja fyritøkur
- eftirlit við skatta- og avgjaldsuppgerðum
- ummæla kæru- og dómsmál
- málsviðgerð

**Vit bjóða:**
- fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði í nýggjum bygnaði, har tú hevur møguleika at ávirka arbeiðsgongdina
- fakligar avbjóðingar og møguleikar fyri eftirútbúgvingum
- flextíð

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Norðurøkið, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum. Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Send umsókn vid avriti av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:

**Toll- og Skattstovu Føroya, Norðurøki**
Postboks 2151 · FO-160 Argir
Stílað: Ingolf Lamhauge, økisstjóri.

**Umsóknarfreist: 16. juli 2007**

Fleiri upplýsingar fært tú við at venda tær til Elsu Brimvík, deildarleiðara ella Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 352600.

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Vaskifólk til Bústovnin Eirargarð 16A/BN

Søkt verður eftir vaskifólki til bústovnin á Eirargarði frá 1. september 2007 til 30. august 2008. 30 tímar um vikuna. Starvið er eitt farloyvisstarv.

**Setarnartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

**Umsókn:**
Send eina umsókn til:

Bústovnurin
Eirargarður 16A/BN
100 Tórshavn
Stílað: Bjørg Mohr, leiðari

**Umsóknarfreist: 15. august 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

## Tvey røktarstarvsfólk til Røktarheimið á Mørkini

Søkt verður eftir einum heilsurøktara 28 tímar um vikuna frá 1. september 2007 og einum heilsu-/ sjúkrahjálpara 28 tímar um vikuna frá 15. september 2007.

**Vit søknast eftir fólki ið:**
- hevur útbúgving sum heilsurøktari, sjúkrahjálpari ella heilsuhjalpari. Fólk við royndum innan eldrarøkt eru eisini vælkomin at søkja
- hevur hug og hegni at veita røkt og umsorgan til húsfólk okkara
- tekur undir við visjónini um at skapa eitt heimligt og lívligt umhvørvi
- hevur hug og hegni at samstarva við ymiskar fakbólkar.

**Vit bjóða:**
- góðar arbeiðsumstøður í nýggjum heimi
- eitt spennandi og mennandi starv, har arbeitt verður tvørfakligt
- eitt starv við nógvum avbjóðingum
- eitt starv í einum øki, sum er í støðugari menning.

Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni í Heimatænastuni. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran Sonju Klein á tlf 333249 ella bólkaleiðaran á Mørkini á telefon 471050.

Umsóknin skal sendast til:

Røktarheimið á Mørkini
Neystavegur
435 Streymnes
Stílað: Kristbjørg Toftegaard

**Umsóknarfreist: 6. august 2007**

Røktarheimið á Mørkini er ein samskipaður partur av Heimatænastuni Vágar/ Norðstreymoy. Fyrstu húsfólkini fluttu inn í mai 2006. Á Mørkini eru 26 búpláss og 6 umlættingapláss. Heimið er býtt út í 4 húski við 8 húsfólkum í hvørjum húski. Aðalsetningurin fyri heimið er at skapa eitt heimligt og livandi umhvørvi, har trivnaður og sjálvsavgerðarrættur hins einstaka er í hásætið.

## Heilsustarvsfólk til Dagumlætting fyri minnisveik á Norðoya Røktarheimi

Eitt tíðaravmarkað starv er leyst at søkja frá 1. september 2007 til 31. desember 2007 við møguleika fyri at halda fram í 2008 um verkætlanin eydnast.

Avgjørt er at seta eina verkætlan í gongd í Ítriv á Norðoya Røktarheimi. Pláss verður fyri umleið 8 heimabúgvandi minnisveikum fólkum til dagumlætting. Umlættingin skal virka frá kl. 9.00 til 17.00 allar yrkadagar.

Tað er ynskiligt, at viðkomandi hevur kunnleika og møguliga royndir innan økið. Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, brennur fyri økinum, er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum, vil mennast fakliga og er opin fyri nýhugsan.

Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin, soleiðis at bæði heimabúgvandi og búfólk á Røktarheiminum fáa nyttu av tiltakinum.

**Setanartreytir:**
Arbeiðstíðin verður minimum 30 tímar um vikuna.

Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðið er í løtuni á Røktarheiminum. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elsbu Lützen, leiðara, á tlf. 457610, 457243 ella 222783.

**Umsókn:**
Umsókn við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og c.v. skulu sendast til:

Norðoya Røktarheim
Stílað: Elsba Lützen
Víkavegur
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist: 6. august 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo